


# Størv í Viðareiðis Skúla

**Søkt verður eftir lærarum og stuðulsfólki til Viðareiðis skúla skúlaárið 2008/09.**

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**
- 1 lærara í fast starv fulla tíð
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv fulla tíð
- 1 lærara til umleið 14 tímar um vikuna (vegna avlopstímar, lækkað tímatal og serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sep.)
- einum stuðli við pedagogiskari ábyrgd 20 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í:
- føroyskum, donskum og enskum
- støddfrøði, náttúru/tøkni og lívfrøði
- kristni og søgu
- handaverki og list
- tónleiki og ítrótti
- tímar vegna serligan tørv
- vera flokslærari

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Stuðulsstarvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

SUNDA KOMMUNA

# Leys størv við Hvalvíkar skúla

## Lýst verður eftir lærara og stuðulsfólki skúlaárið 2008/2009

- 1 tíðaravmarkað lærarastarv
- 1 starv sum stuðulsfólk til næming við serligum tørvi, 25 tímar um vikuna

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður í lærarastarvið, skal hava læraraútbúgving. Ynskiligt er, at viðkomandi kann undirvísa í smíð, ítrótti og svimjing.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður sum stuðulsfólk, hevur námsfrøðiliga ella aðra viðkomandi útbúgving/starvsroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið sum stuðulsfólk verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við CV, avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 24. juni, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aslaug Olsen, skúlaleiðara, á telefon 422028 ella 772028.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hvalvíkar Skúla*
*Skúlavegur 1*
*430 Hvalvík*

**Hvalvíkar skúli** hevur komandi ár uml. 45 næmingar og 5 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.

# SKÓTALEIÐARAR,
## VIRKNIR SUM FYRRVERANDI

Fríggjakvøldið kl. 18.00 á Kambsdali verður hugni, døgurði, fyrilestur og legubál.

Skótin og vinnulívsmaðurin Lars Kolind hugleiðir um altjóða skótaarbeiðið.

**Tekning á tlf. 210676. Kostnaður 225,- kr.**

**KFUM skótarnir í Føroyum**

SUNDA KOMMUNA

# Starvsfólk til umhvørvisplássið

**Søkt verður eftir umsjónarfólki til umhvørvisplássið hjá Sunda kommunu at byrja 1. juli 2008, ella eftir nærri avtalu. Umhvørvisplássið er í Nesvík.**

Talan er um nýtt fulltíðarstarv og er arbeiðstíðin frá týsdegi til og við leygardag.

Høvuðsuppgávan verður at taka tær av umhvørvisplássinum ta tíð, tað er opið. Harafturat verður burturkast savnað frá stovnum í kommununi, umframt at umsjónarfólkið hevur eyguni við umhvørvisviðurskiftum í kommununi sum heild. Neyðugt er, at viðkomandi hevur koyrikort.

**Vit ynskja, at tú:**
- er røkin og hevur ein livandi áhuga fyri umhvørvinum
- dugir at samstarva og ert fyrikomandi
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur eyga fyri, hvat fyriferst rundan um teg.
- Er røkin og hevur ein livandi áhuga fyri umhvørvinum

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á teknisku deild, Jógvan Waagstein, tlf. 471027 ella 771027.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18.06.2008 og skulu sendast til:

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

**Sunda kommuna** fevnir um bygdirnar Hósvík, Hvalvík, Streymnes, Saksun, Langasand, Haldórsvík, Tjørnuvík, Oyri, Oyrarbakka, Norðskála og Gjógv. Har búgva til-samans uml. 1600 fólk sum kommunan strembar eftir at veita munadyggar tænastur á øllum økjum.




# Lastbilførari

Avloysari søkist frá 19/6 – 4/7.

Stóra koyrikortið krevst.

**Áhugaði ringið á tlf. 50 51 92**

Sosialurin
www.sosialurin.fo